## Jupiter í dokk á Skála

Hesa vikuna stendur nóta- og trolskipið Jupiter í dokkkini á Skála Skipasmiðju. Jupiter hevur roynt eftir svartkjafti, men nú fiskaríið er minkað munandi, er skipið farið í dokk at fáa neyðugar ábøtur gjørdar. Gjáramorgunin kom skipið í dokkina á Skála, har menn hjá skipasmiðjuni skulu skifta pakkdósirnar til tær báðar bógskrúvurnar og høvuðsskrúvuna. Samstundis skal botnurin málast. Tað hevur gingið væl hjá Jupiter á svartkjaftinum í ár. Seinasta túr vóru teir á Fuglafirði við 1.850 tonsum, sum teir høvdu fingið báðumegin markið á Íslandsrygginum. Væntandi verður Jupiter klárur at fara aftur til fiskarí beint eftir vikuskiftið, skrivar reiðaríið á heimasíðuni.



# Líkist Føroyum í mangar mátar

**Í hesum døgum er forsetin í sjálvstýrandi landspartinum Valle d'Aosta í Norðuritalien á vitjan í Føroyum. Hann ynskir tættari samband við Føroyar og vil fegin, at føroyskir studentar koma á universitetið í Valle d'Aosta at lesa**

VITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevði fund við Luciano Caveri, landslutaforseta í Valle d'Aosta, sum í hesum døgum er á vitjan í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Luciano Caveri eitur forsetin í sjálvstýrandi landslutinim Valle d'Aosta í Norðuritalia. Hann er í hesum døgum á vitjan í Føroyum, og tað er ikki heilt av tilvild.

Caveri hevur sitið í Europaparlamentinum, og har hevur hann fingið kunnskap um Danmark, og harígjøgnum eisini Føroyar. Og land okkara líkist á mangar mátar hansara egna landsluti. Í ólukkumát eisini.

Tað byrjar longu við, at landsluturin Valle d'Aosta fekk sjálvstýri í 1948. Teir hava seks »landsstýrismenn« umframt ein forseta. Og teir hava tveir tinglimir í italska tinginum. Í teirra egna tingi sita 35 limir, so alt tilsamans er talan um ein líkleika, sum er ógvuliga stórur.

Luciano Caveri er eisini ivaleysur í, at hann vil vitja nøkur ávís lond, sum líkjast hansara egna landsluti. Hann velur tí út tey lond og teir landslutir, sum líkjast hansara egna, og eisini málsliga líkjast Føroyar og Valle d'Aosta á tann hátt, at bæði hava egið mál.

Landslutaforsetin ætlar, at føroyingar skulu koma til teirra á vitjan, og tí er tað eisini ein fyrireiking av hesum túrinum, sum ætlandi verður í oktober í ár, sum Luciano Valeri ger.

### Millum fjøll

- Tit hava eitt land, sum eru oyggjar í havinum. Hjá okkum er tað næstan tað sama. Hjá okkum er tað tó soleiðis, at vit eru eitt »oyggjaland« millum fjøll, segði Luciano Caveri.

Hann ivast ikki í, at løgmaður fer at verða bilsin, tá hann kemur á vitjan í Italia. Líkleikin er so mikið stórur, tó at talan í veruleikanum er um heilt ymisk lond, ella landslut, rættari sagt.

Á einum øki man tó vera stórur munur, og tað er veðrið. Tí hóast vit nú í nakrar dagar hava havt óført veður, kann tað neyvan máta seg við tað, tey hava í Valle d'Aosta.

Landsluturin er góðar 3000 ferkilometrar og íbúgvaratalið er áleið 120.000. Økið er millum tey tunnast fólkaðu í øllum Italia, og íbúgvaratalið er 37 fyri hvønn ferkilometur. Landsluturin hevur mark móti Fraklandi í vestri, Sveits í norði og landslutinum Piemonte í suðri. Har eru ikki færri enn 74 kommunur í landslutinum.

# Partabrøv eru spennandi

**Tað er ógvuliga áhugavert at gera íløgur í partabrøv, bæði sum barnauppsparing og sum pensjón. Men tað er eisini neyðugt at seta seg so væl inn í marknaðin sum gjørligt, og ikki gloyma, at tað saktans eisini kann vera ein vandi í hesum, sigur Egon Danielsen, sum seinasta hálvtannað árið hevur fingist við at gera íløgur í partabrøv**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein teirra, sum nú í eina tíð hava fingist við at gera íløgur í partabrøv, er Egon Danielsen av Argjum. Hann hevur eisini teknað partabrøv í Føroya Banka, men, sum hann sjálvur tekur til: Tað eru fleiri, sum hava teknað meiri enn eg í Føroya Banka.

Seinasta hálvtannað árið hevur Egon fingist við at keypa og selja partabrøv, og tað hevur verið á danska marknaðinum.

- Eg havi lisið nógv um hetta, og eri eisini limur í Dansk Aktionærforening. Har fáa vit fast eitt limablað einaferð um mánaðin, og tey eru ógvuliga lærurík, sigur Egon Danielsen.

Partabrævamarknaðurin hevur verið ógvuliga góður seinastu árini, og tað ger sjálvandi eisini, at kursurin er høgur í flestu førum. Egon ger so íløgur í fyritøkur, sum honum líkar væl, og tað kann vera alt frá gjøgnum íløgufelag um pakkaloysnir til einstakar fyritøkur.

Statoil í Noregi, Den Danske Bank og Nordea eru fyritøkur, har Egon Danielsen hevur handlað við partabrøvum, og eisini Vestas er fyri hann ein áhugaverd fyritøka, sjálvt um partabrøvini júst har ikki eru tey mest áhugaverdu í løtuni.

- Tað er ikki bara spennandi at handla við partabrøvum, tað er eisini neyðugt, fyri at tilføra fyritøkunum kapital, so hesar kunnu menna seg. Einki er at ivast í, at júst partabrævamarknaðurin er største orsøkin til, at danska vinnulívið er so væl fyri, sigur Egon Danielsen.

### Brúkar marknaðin

Nógvir møguleikar eru á marknaðinum, og nú føroyskar fyritøkur eisini verða børsskrásettar, gevur hetta fleiri føroyingum møguleika at handla á partabrævamarknaðinum. Men Egon ávarar móti ov stórum bjartskygni.

- Eg ráði staðiliga øllum til at gerast limir í Dansk Aktionærforening. Tí tað er als ikki vandaleyst at handla á partabrævamarknaðinum, og tí er vitan um marknaðin alneyðug, sigur Egon Danielsen.

Tað verður alla tíðina arbeitt við at seta nýggjar fyritøkur á stovn, og skulu hesar hava líkindi at menna seg er neyðuygt, at tær verða skrásettar á børsinum. Tá ber til hjá fólki at seta pengar í, og fyritøkurnar fáa møguleika at menna seg.



*Neyðugt er við einari hollari vitan um partabrævamarknaðin, sigur Egon Danielsen, sum sjálvur lesur nógv um hesi viðurskifti*

Spurningurin er eisini, um íløgurnar eru langsiktaðar, ella ikki. Tað ber ofta til at keypa partabrøv fyri síðani at selja stutt eftir, um marknaðurin lagar seg soleiðis. Og Egon Danielsen fæst við báðar møguleikar.

- Eg geri alt, sum til ber at gera á marknaðinum, sigur hann.

- At íløgurnar eru lønandi avger kursurin. Er talan um kurshækking vinnist peningur tann vegin, men annar møguleiki er vinningsbýti. Skal tað hepnast, er neyðugt við vitan, undirstrikar Egon Danielsen av Argjum.